# Tórshavnar Sløkkilið klárt til ársskiftið

NÝGGJÁRSHALD

*Bartal Nolsøe Poulsen*

Meðan nýggjársfyrireikingarnar eru um at vera av á hesum sinni, og vit eru til reiðar at bjóða nýggja árinum vælkomnum á midnátt í kvøld við fýrverki og báli, so er dagurin í dag bert ein annar arbeiðsdagur hjá sløkkiliðnum í Havn. Av brandstøðini verður sagt, at teir eru vælmannaðir sum altíð. Av teimum 30 monnunum, ið eru knýttir at støðini, standa 15 mans til reiðar um ársskiftið, um nakað skuldi verið á vási.

Brandstøðin hevur ikki gjørt sum løgreglan og boðsent eyka manning til arbeiðis í kvøld. Ártúsundskiftið var nakað serligt, og tá sótu øll á nálum, tá ið leið ímóti midnátt, eisini brandmeistarin í Havn. Ta ferðina varð eyka fólk boðsent, men nú um dagarnar verður tað ikki hildið verða neyðugt.

- Vit seta trygdina í hásæti allar dagar í árinum, so í so máta er 31. des. bert ein vanligur arbeiðsdagur hjá okkum, sigur vakthavandi á Brandstøðini. Støðin við Oyggjavegin er mannað 24 tímar um døgnið, alt árið, og eitt fullbúgvið sløkkilið kann standa klárt 5 minuttir eftir at alarmurin er settur í gongd.



*31. des. er ikki stórt annað enn ein vanligur arbeiðsdagur á brandstøðini í Havn*

Á brandstøðini fegnast teir um veðrið nú um dagarnar. Hóast hálkan kann seinkað teimum eitt sindur, er niðurkomnið kavin kærkomin um ársskiftið. – Størsti brunavandin á nýggjárinum hevur ofta staðist av, at rakettir og annað fýrverk kemur ov nær mongu flagtekjunum, men í hesum veðrinum er lítil vandi fyri, at ein miseydnað rakett festir í tekjurnar, verður sagt.

Annar vandi liggur í mongu nýggjársbálunum, ið verða brend um landið í kvøld. Bálini eru heldur mong í Tórshavnar Kommunu, so brandstøðin hevur ikki fólk til at vera á staðnum við hvørt bál. Áðrenn fest verður í nýggjársbálið hava fyrireikarnir skyldu at boða frá tiltakinum, og brandstøðin skal hava navn og bústað hjá einum ábyrgdarpersóni, og sostatt skuldu teir á Oyggjavegnum havt ein lista yvir øll bál, sum verða brend í kvøld.

– Nú viðurskiftini í samband við nýggjársbál eru meira skipaði enn tey áður hava verið, haldi eg eisini at ymsu fyrireikarnir kenna eina størri ábyrgdarkenslu, og hetta minkar beinanvegin um vandan fyri ósketni, ið kann elva til eldsbruna. Nýggjársbálini eiga ikki longur at vera eitt gott høvi til at tøma sær kjallaran fyri burturkast, ið átti at verið beint á Sandvíkarhjalla.

Sagt verður annars av brandstøðini, at jólini vóru stak friðarlig. Tað einasta, ið teir høvdu til at taka um høgtíðina var at hjálpa bilførarum, ið onkursvegna vóru komnir illa fyri í hálkuni.

# Sølan av nýggjum akførum minkar framvegis



**Bileftirlitið er komið við hagtølum fyri skráseting av nýggjum akførum í 2002 og 2003. Samlaða úrslitið gjørdist ein minking upp á 161 akfør í mun til 2002. Flest nýggir Mazda vórðu skrásettir í 2003**

AKFØR

*Magnus Gunnarsson*

*maggi@sosialurin.fo*

Bileftirlitið sendir javnan út tíðindaskriv við hagtølum yvir skráseting av nýggjum akførum. Nú fingu vit so tey samlaðu tølini fyri 2003 í mun til 2002.

Tølini vísa, at tilsamans vórðu skrásett 1910 nýggj akfør, viðfestisvognar íroknaðir, + 195 prutl. Eisini sæst at tað bert eru seldir 4 nýggir bussar í ár ímóti 17 í fjør, tá ein stórur partur av bussunum hjá Bygdaleiðir og Bussleiðini í Havn vóru skiftir út.

Á hýruvognunum er ikki so stórur munur, ein lítil minking, men talið á motorsúkklum ar vaksið. Tað at alt fleiri taka koyrikort til motorsúkklu sæst eisini aftur í tølunum.

Talið á persónbilum er minkað við umleið níggju prosentum. Minkingin er væl minni enn tølini gjøgnum árið hava víst. Fyri nøkrum fáum mánaðum síðan vóru umleið 200 bilar færri skrásettir, men endaliga talið bleiv 134 bilar. Í desember 2002 vóru bert skrásettir 61 persónbilar í mun til 122 í ár.

Eisini færri vøruvognar eru skrásettir - í prosentum tað sama sum persónbilarnir.

Sambært skrásetingini av nýggjum akførum vóru hesi fimm bilmerkini tey mest seldu í 2003: Mazda við 306, Toyota við 293 (+ 10 Lexus), Citroën við 179, Peugeot við 160, og Ford við 130 seldum bilum.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-DES í 2003 og 2002**

| Akfaraslag | Des 2003 | Des 2002 | Broyting Des 03/02 | Jan-Des 2003 | Jan-Des 2002 | broyting 2003-2002 | %broyting 2003-2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Brandbilar** | 0 | 1 | -1 | 1 | 2 | -1 | -50,00% |
| **Bussar** | 0 | 0 | 0 | 4 | 17 | -13 | -76,47% |
| **Kampingvognar** | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | |
| **Hýrubilar** | 0 | 1 | -1 | 19 | 26 | -7 | -26,92% |
| **Lastbilar** | 1 | 2 | -1 | 23 | 19 | 4 | 21,05% |
| **Leguvognar** | 0 | 0 | 0 | 6 | 3 | 3 | 100,00% |
| **Motorsúkkla** | 0 | 1 | -1 | 13 | 8 | 5 | 62,50% |
| **Neyðsendakfar** | 1 | 1 | 0 | 5 | 5 | 0 | 0,00% |
| **Persónbilar** | 122 | 61 | 61 | 1393 | 1527 | -134 | -8,78% |
| **Smábussar** | 0 | 1 | -1 | 6 | 3 | 3 | 100,00% |
| **Tangabilar** | 0 | 1 | -1 | 4 | 2 | 2 | 100,00% |
| **Viðfestivognar** | 3 | 9 | -6 | 128 | 123 | 5 | 4,07% |
| **Vøruvognar** | 61 | 26 | 35 | 307 | 336 | -29 | -8,63% |
| **Samlað** | 188 | 104 | 84 | 1910 | 2071 | -161 | -7,77% |

Harafturat eru skrásett 195 nýggj prutl í 2003.



# Tjóðpallur Føroya í leysari luft

**Tjóðpallur Føroya er endaður í eini bíðistøðu, nú val er útskrivað í ótíð. Fíggjarlógin er dottin niðurfyri, og tað vil siga, at ongin játtan er til Tjóðpallin, so hann kann fara í gongd komandi ár sum ætlað. Í ringasta føri kann ein nýggjur mentamálaráðharri forpurra játtan til Tjóðpallin**



*Myndatxt: Tjóðpallur Føroya er nú í eini bíðistøðu. Við valinum, sum varð útskrivað í ótíð, er játtanin til Tjóðpallin enn ógreið. Í ringasta føri kann nýggi landsstýrismaðurin nokta at lata pening til pallin, føroyskir sjónleikarar so leingi hava bíðað eftir*

*Savnsmynd*

TJÓÐPALLUR

*Ingrid Bjarnastein*

*ingrid@sosialurin.fo*

Í mai mánaði í ár var løgtingslóg nummar 68 samtykt. Hon snýr seg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist, sum føroyskir sjónleikarar hava bíðað eftir í áravís. Og 2. november 2003 kom hon so í gildi.

Men nú val er útskrivað í ótíð, er Tjóðpallurin endaður í eini bíðistøðu. Fíggjarlógin datt jú eisini niðurfyri aftaná, at valið varð útskrivað, og harvið eisini játtanin til Tjóðpallin fyri 2004. Hetta hevur við sær, at nú slepst ikki ígongd fyrr enn valið hevur verið, nýggj samgonga er skipað og fíggjarlógin 2004 er samtykt.

Í og við nýggjari samgongu og nýggjum landsstýrismonnum kann tað í ringasta føri merkja, at Tjóðpallurin ongar játtan fær, men so svartskygdir eru yrkisleikararnir í Føroyum tó ikki. Tá lógaruppskotið var fyri í løgtinginum fekk tað bert eina atkvøðu ímóti, og ein atkvøða var blonk. Restin av atkvøðunum vóru fyri.

– Tað er tann besti stuðulin ein kann fáa. Nú mugu vit bara bíða til politikkararnir fylgja tí upp, sum varð avgjørt tá, sigur Jenny Petersen, dagligur leiðari hjá leikhúsinum Gríma.

### Stórt framstig

Sambært lógini um Tjóðpall Føroya skal setast eitt leiklistaráð við sjey limum. Tveir limir skulu útnevnast av landsstýrismanninum í mentamálum. Men nú politikkararnir hava pakkað saman, so verða bert týdningarmiklar avgerðir tiknar í Mentamálaráðnum. Og tá onki leiklistaráð kann setast, tí teir báðir limirnir ikki verða settir av landsstýrismanninum, sum í løtuni er løgmaður, so verður heldur ongin stjóri settur.

Men Jenny Petersen er bjartskygd, hvat Tjóðpallinum viðvíkur.

– Tað er eitt sindur keðiligt, at vit ikki kunnu koma í gongd sum ætlað, men Gríma heldur so fram í verandi líki, inntil Tjóðpallurin kemur. Við lógini hevur leiklistin í Føroyum tikið eitt stórt fet frameftir, sigur hon.

Hinvegin so verður tað nógv lættari at arbeiða fram í tíðina.

– Við lógini kann ein siga, at vit fáa tryggari fíggjarligar rammur. Til dømis verður tað lættari hjá okkum at fáa fólk úti frá, tí vit frammanundan vita, hvussu nógvan pening okkum verður latin.

Men sum er í løtuni hongur Tjóðpallur Føroya í leysari luft. Og ongin avgerð verður tikin fyrr enn nýggjur landsstýrismaður í mentamálum er settur.

# Arbeiðseftirlitið svarar blaðgrein í Dimmalætting

**Karl Joensen, stjóri**

*Arbeiðseftirlitið*

Í Dimmalætting mikudagin tann 17. desember er blaðgrein við yvirskriftini: Álvarsamt misálit á Arbeiðseftirlitið.

Blaðmaðurin skrivar her um átakið, sum Arbeiðseftirlitið fór undir í seinnu helvt av september 2002 og sum hevði til endamáls, at kanna trygdina á fiskavirkjum.

Um sjálva greinina er at siga, at tað er trupult at fáa samanhang í tí sum skrivað verður t.d. tá blaðmaðurin upplýsir, at sjey virkir vóru fráboðað løgregluni fyri brot á umhvørvislógina og av hesum sjey virkjunum fingu nøkur virkir smærri sektaruppskot og somuleiðis av hesum sjey virkjunum ger fútin í fleiri førum einki við málið, tí talan er um bagatellir.

Blaðmaðurin skrivar síðan, at ákæra ikki verður reist móti nøkrum av hesum sjey virkjunum - also fútin hevur givið nøkrum virkjum sektaruppskot men fútin reisir ikki ákæru.

Fútin kann eftir rættargangslógini § 931 avgreiða mál, uttan at hesi verða havd í rættinum, um so er at skuldsetti ásannar seg sekan í brotinum og váttar at vilja rinda bótina, men ákæruskrift er tó partur av sektaruppskotinum, sum tilskilar, hvørjar heimildirnar eru fyri sektaruppskotinum; verður bótin ikki goldin endar málið av sær sjálvum í rættinum.

Sum greitt frá í tíðindaskrivi frá Arbeiðseftirlitinum tann 6. september 2002 fóru eftirlitsfólk hjá stovninum, uttan av boða frá frammanundan, at vitja fiskavirkir um alt landið og fór eftirlitið m.a. at umfata, um hóskandi maskinvernd varð nýtt, um neyðsteðgarar vóru har teir upprunaliga áttu at vera og um virkini virkaðu sum fyriskrivað.

Tílíkt eftirlit er partur av uppgávuni hjá Arbeiðseftirlitinum at ansa eftir, at lógin og tær ásetingar sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

Umframt hetta serliga átak fremur Arbeiðseftirlitið reglulig eftirlit, sum ikki verður kunnað um.

Arbeiðseftirlitið kann krevja, at viðurskifti, sum ikki eru í sansvar við ásetingar í lóg og kunngerðum, beinanvegin ella áðrenn eina av Arbeiðseftirlitinum ásetta freist, verða fingin í rættlag.

Um tílík boð ikki verða fylgd og Arbeiðseftirlitið metir at eftirlits- og góðkenningar møguleikin er úttømdur, er bert tann evsti møguleikin eftir og tað er at boða løgregluni frá málinum.

Metir Arbeiðseftirlitið, at grundleggjandi trygdarskipanir eru broyttar soleiðis, at vandi er fyri trygdini hjá arbeiðsfólkunum, er talan um so álvarsamt brot á ásetingar í lóg og kunngerð, at málið verður fráboðað løgregluni beinanvegin, umframt at Arbeiðseftrilitið kann krevja at vandin beinanvegin verður beindur burtur m.a. við at arbeiðsfólk fáa boð um, at fara úr vandaøkinum og at alt arbeiði á nevnda øki verður steðgað.

Arbeiðseftirlitið ger sostatt sítt arbeiði eftir fyrisettum reglum og har møguleikarnir hjá Arbeiðseftirlitinum ikki røkka longur, verður málið latið fútanum.

Ikki ber til hjá Arbeiðseftirlitinum at ráða yvir tí orku, sum løgreglan hevur til at avgreiða hesi mál og somuleiðis hevur fútin sum ákærumyndugleiki ta endaligu avgerð, hvussu hann metir at málið frá sær skal avgreiðast, tó soleiðis at revsingin, um hægri revsing ikki er heimilað í aðrari lóggávu, verður samsvarandi lóg um arbeiðsumhvørvi, sum ásetur at brot v.m. verða revsað við bót, hefti ella fongsul í upp til eitt ár.

Vit meta at samstarvið millum stovnarnar er gott og regluligt samskiftið er um tey ymsu málini.

Endaliga kunnu vit gleðast um niðurstøðuna hjá blaðmanninum um, at kanningin hjá Arbeiðseftirlitinum hevur ikki verið til fánýtis, tí 48 virkið vórðu kannað og har av fingu 45 av teimum boð um at gera ábøtur á verandi trygdarumhvørvi.

Tórshavn, tann
17. desember 2003